Undantaksstøða í Vági

Reportaga: Vágbingar og suðuroyingar annars tveittu alt annað frá fær, tá tað leygardagin eydnaðist at vinna føroyameistaraheitið í fótbólti fyri fyrstu ferð í søguni

John Johannessen

Okur eru fyrjameistarar…!!! Okur eru fyrjameistarar…!!!

Mynd: John Johannessen

Smyril minti mest um eitt av flóttafólkaskipunum av Cuba, sum vit plaga at síggja í sjónvarpinum, tá hann stevndi inn á Vágsfjørð leygarkvøldið.

Bátadekkið og brúgvaveingirnir vóru stúgvandi fullir av fólki. Men hetta var ikki nóg mikið. Heilt uppi á sjálvum brúgvatakinum var eisini riðil av fólki komin saman at heilsa teimum, sum á landi tóku ímóti hetjunum, ið høvdu megnað at vunnið føroyameistarasteypin til Vágs fyri fyrstu ferð í søguni.

Tann vanliga langi túrurin um Suðuroyarfjørð við Smyrli tóktist leygarkvøldið bert vara eina evarska lítla løtu. Mikli veitslurómurin gjørdi, at tú ikki visti av fyrr enn skipið stevndi inn á Vágsfjørð. Hetta var uttan iva hjá mongum eina tann minniligasti túrurin til Suðuroyar nakrantíð.

Heilsaðu við neyðblussum

Á landi var lagið minst líka gott sum umborð á Smyrli, tá hetjurnar saman við trúgvu áskoðarum sínum stevndu inn um Porkerisnes.

Porkeningar sendu í luftina avlopið av fýrverkinum frá seinsta nýggjárshaldi, og allan vegin inn eftir fjørðinum losaðu blunkandi og ýlandi bilar Smyril til Vágs.

Umborð varð heilsað aftur við lúðrum, sangi, neyðrakettum og neyðblussum. Og tá Smyril var komin væl inn á fjørðin, tók ein sleipari hjá skipasmiðjuni ímóti við neyðblussum. Sama gjørdu skipini, ið lógu við bryggjuna.

Á bryggjuni vóru øll, ið kundu krúpa, komin saman at taka ímóti hetjunum. Og rómurin var góður – eingin ivi um tað.

Nýggjár umaftur

Nýggjarshaldið í Vági er tiltikið og man vera tað best fyriskipaða í landinum. Men veitslan leygarkvøldið stóð lítið aftanfyri.

Tá leikararnir væl og virðiliga vóru komnir í land og høvdu fingið allar teir mongu kossarnir, ið hoyrdu til, fóru teir allir í ein lastbil, sum við stórum fylgi koyrdi teir gjøgnum býin.

Vesturi á trýkantinum, tey kalla tað, vóru blikk við eldi sett upp, soleiðis at har stóð skrivað VB. Eisini høvdu vágbingar sett upp kyndlar, sum logaðu væl og leingi í dýrdarveðrinum. Lítil ivi um, at ikki mangur vágbingur og suðuroyingar sum heild feldi tár hetta kvøldið.

Veitsla til tann ljósa morgun

Vesturi í ítróttarhøllini á Eiðinum var eisini stór móttøka við kakum, breyði og einari kaldari øl afturvið mongu rørandi røðunum. Virknu kvinnurnar í Vági høvdu í dagar smurt breyð til teir mongu gestirnar, og væl smakkaði.

Rómurin í VB-høllini helt á til tann ljósa morgun. Í VB húsinum vóru so nógv fólk samankomin til dansin, at illa var framkomandi í øllum meldrinum. Men tíbetur bar til hjá fókli at sita í høllini og práta saman og fegnast um, at tað eftir 95 ár umsíðir eydnaðist at vinna føroyameistaraheitið.

Sanniliga ein minniligur dagur í Vági.

Tórur Holm og Jón Gærdbo fegnast um steypin

Feðgarnir báðir, Páll Augustinussen, hjálparvenjari, og Palli, leikari á 1. deild, fegnast um gullkrúnurnar

Mynd: John Johannessen

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini Ítróttasosialin á alnetinum

www.sosialurin.fo

Eingin landsli›sleikari

Ta› man vera eindømi í n‡ggjari tí›, at eitt li› er vor›i› føroyameistari uttan at eiga ein tann einasta landsli›sleikara

Jákup Mørk

Eftir dystin tustu vi›haldsfólk inn á vøllin, og sjampanjan rann í strí›um streymi

Lagi› á ásko›arunum var av tí besta

Fyrsta landskappingin í n‡ggja túsundára skei›num er nú li›ug, og tá tiki› ver›ur samanum, kann ikki sigast anna› enn, at endaliga stø›an var heldur óvænta›.

VB mundi ikki vera ta› li›i›, sum flestu fótbóltsáhuga› høvdu sum fremsta FM-heiti›, men tá alt kom til stykkis, vóru vágbingarnir teir drúgvastu.

Mest merkisverda vi› li›num er, at ikki ein tann einasti av teimum leikarum, sum í árinum hava veri› á vølli fyri VB, eiga pláss í hitanum hjá Allani Simonsen.

Tó so, onkur av útlendsku leikarunum høvdu ivaleyst veri› á landsli›num, var pass teirra føroyskt, men umframt dygdirnar hjá einstøku leikarunum, hevur ta› fyrst og fremt veri› kollektiva styrkin, sum hevur bori› li›i› gjøgnum ári›.

Málverjin, Bjarni Johansen, hevur tó onkuntí› veri› vi› í landsli›shópinum, og avrik hansara í ár hava eisini veri› sera sannførandi.

Dentur á verjupartin

Stóra styrkin hjá VB li›num hevur hetta ári› veri›, at teir hava veri› sera væl skipa›ir í verjupartinum.

Talan er um so at siga sama fólk, sum hevur manna› verjupartin í drúgt áramál. Naka› sum sjálvandi merkist, tí leikararnir kenna hvønn annan somiki› væl, og duga sera væl at lesa, hvat annar parturin ger í ymsu stø›unum á vøllinum.

Framman fyri mi›verjuna hava teir so at siga alt ári› havt ein uppruddara á mi›vøllinum, og so tveir framrætta›ar leikarar, sum fyri ta› mesta hava veri› Tór›ur Holm og Milan Kulic.

Umframt at vera væl skipa›ir í verjupartinum, hevur sterkasta álopsvápni› veri› kontraálopini. Ein t‡›andi partur av hesum hevur veri› Jón Pauli Olsen, sum í álopspartinum nærum hevur virka› sum eyka áleypari. Skal naka› landsli›sevni finnast millum útileikararnar á VB li›num, er ta› kanska júst Jón Pauli, hóast aldur hansara helst inniber, at hann neyvan kemur upp á tal í so máta.

Harumframt hevur VB so eisini havt eitt ta› vandamesta álopspari› í landinum. Leikandi venjarin, Krzystof Popczynski og landsma›ur hansara úr Póllandi, Robert Cieslewicz hava í ár veri› førir fyri at givi› øllum landsins verjum alstórar trupulleikar. Leygardagin vóru ta› júst teir bá›ir, sum vi› tveimum málum syrgdu fyri, at meistaraheiti› í fyrstu deild hjá monnum enda›i í Vági hetta kappingarári›. Eitt kappingarár, sum hevur talst millum tey mest spennandi nakrantí›, og har einki var avgjørt fyrr enn seinasta bríksli› hev›i ljó›a›.

Føroyameistarar í 1. deild 2000 VB

Myndir: Álvur Haraldsen